# Chevrolet Epica við dieselmotori

**Luksusbilurin Chevrolet Epica, sum hevur vent upp og niður upp á prísleguna í sínum klassa, við tað at hann sum ein stórur og rúmligur bilur við allari útgerð er í sama prísklassa sum bilar í miðalklassanum, fæst nú eisini sum diesel**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




Chevrolet Epica fæst nú við 2,0 litra commonrail dieselmotori við 146 hk

Tað er nærum ein sjálvfylgja, at allir nýggir bilar eisini fáast sum diesel, um teir skulu kunna kappast á líka fót við kappingarneytarnar á marknaðinum.

Nú fæst Chevrolet Epica, sum hvat støðd, útgerð og komforti viðvíkur er at sammeta við stóru dýru luksusbilarnar, men í prísi megnar at kappast við bilar í miðalklassanum, eisini sum diesel. Hetta er ein 2,0 litra commonrail dieselmotorur við 146 hk og snúningsmomenti upp á 310 Nm við 2.000 snún/min - sami motorur sum er í Chevrolet Captiva.

Talan er um ein kvikan og økonomiskan dieselmotor, sum koyrir frá 0-100 upp á 9,7 sek (manuell gir) og 10,1 sek (automatgir). Oljunýtslan er 16,4 km/l (blandað koyring), og toppferðin er yvir 200 km/t.

Sum standard hevur Epica diesel 5-trins girkassa, men fæst eisini við automatiskum girum.

Epica fæst annars við tveimum 6 syl. raðmotorum: 2,0 litur við 143 hk og 2,5 litur við 156 hk. Í mun til bensinútgávurnar er Epica ikki so nógv dýrari sum diesel.

Epica við dieselmotori er væl egnaður sum hýruvognur. Í dieselútgávuni kostar hann kr. 285.000 og við automatiskum girum kostar hann 302.000. Bilurin kann síggjast og roynast hjá VR Bilum.

# Shelby Cobra seldur fyri 32 milliónir

**Einasta eintak av einum sergjørdum Shelby Cobra frá 1966 er seldur á eini uppboðssølu í Arizona fyri 5,5 milliónir dollarar, svarandi til umleið 32 milliónir krónur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sølan av hesum Shelby Cobra er met fyri amerikanskt bygdar bilar, ið nakrantíð eru seldir á uppboðssølu.

Talan er um ein Shelby Cobra Super Snake frá 1966, framleiddur til egna nýtslu av tí navnframa og nú 84-ára gamla Carroll Shelby, ið eisini hevur staðið fyri nógvum ymiskum útgávum av Ford sportbilum gjøgnum tíðirnar.

Hesin Shelby Cobra Super Snake hevur 800 hestar og kláraði longu fyri 40 árum síðan at koyra frá 0-100 km/t upp á 3 sekund, greiddi Carrol Shelby frá undir uppboðsssøluni í Scottsdale í Arizona.

Upprunaliga vóru tað tveir Shelby Super Snake. Hin varð gjørdur til amerikanska sjónleikaran Bill Cosby, men hesin gjørdist seinni vrak, nakað eftir at Bill Cosby hevði selt bilin.

Keyparin av hesum Shelby Cobra var amerikanski entreprenørurin og bilsavnarin Ron Pratt.



*Carroll Shelby, sum er í dag 84-ára gamal, hevur eisini staðið fyri nógvum ymiskum útgávum av Ford sportbilum gjøgnum tíðirnar*



*Hesin Shelby Cobra Super Snake frá 1966 við 800 hk er seldur á eini uppboðssølu í Arizona fyri umleið 32 milliónir krónur*